Watson í Guardian:

Eg eri ein ey›mjúkur fanatikari

Journalisturin John Vidal hjá The Guardian er vi› Paul Watson undir Føroyum. Seinasta mikudag var drúgv grein í hesum heimskenda bla›i um Paul Watson og hansara fer› í føroyskum sjógvi

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Pollamjørkin liggur vakur í Nólsoyarfir›i í morgun, mánamorgun, heilt inn at landi uttanfyri Molan. Uttanfyri Skansabo›a hómar tú siluettina av einum gráum skipi vi› tunnu í formastrini. Er ta› »Ocean Warrior« sum hóast allar hugsandi hóttanir hevur vága› sær aftur í føroyskan sjógv. Alt gerst so stórt í mjørka. Tí›indama›urin gerst eitt sindur vónbrotin, tá hann finnir fram til, at gráa skipi› er eitt danskt vaktarskip, sum einans ger sína skyldu at verja ta donsku »overhøjhed« udi Færø.

Er »Ocean Warrior« í føroyskum sjógvi? Ta› er ikki lætt at finna fram til, tí ongin av teim vanligu kanalunum hava myndugleika at úttala seg og tann sum kann úttala seg er ikki at hitta í løtuni. Hetta er eitt mál av størsta t‡dningi og ta› er ikki hvør sum helst, sum sleppir at úttala seg.

Sólin bakar og oyggjarnar liggja heilt ævint‡rkendar í øllum hitanum, sum kliptar burturúr einum Tjæreborgkatalogi.

Onki er sum ta› hevur veri›. Tvær reisur seinastu dagarnar hevur grind veri› í Føroyum, men ta› tykist sum føroyingar hava gjørt sær sjálvum ena bjarnatænastu. Teir hava sett radiosendarar á Ísak, Mads Petur og ein heilt annan og hesir hava nú úr at gera at svimja millum teir bólkar, sum eru í vanda fyri at ver›a hildnir til og so skjótt sum teir narkast, so sigur Doreta bums nei. Ta› kundu húsvíkingar sanna um vikuskifti›, me›an svangir grindamenn hvessa sær tunnurnar og vaska tómu snikutu lakaíløtini.

Diktator

The Guardian frá seinasta mikudegi liggur á bor›inum. Hann ver›ur helst einasta keldan í dag til Warson. Journalisturin John Vidal er ein av manningini og hann hevur uppliva› eitt sindur av hvørjum seinastu dagarnar. Hann hevur uppliva› at ver›i handtikin í Føroyum og hevur enntá siti› í føroyskum var›haldi. Og føroyska fangatippi fær gott ummæli í The Guardian. Ta› ver›ur samanabor›i vi› eitt gott bretskt Bread and Breakfast gistingarhús.

John Vidal byrjar greinina vi› at l‡sa føroyska landslagi› og sí›an ger hann eina l‡sing av Paul Watson. John stendur á manningarlistanum umbord á »Ocean Warrior« og hann hevur havt gó›ar stundir at eyglei›a hendan sjaldsama umhvørvisstrí›smann.

»Watson er róligur og er fúsur at tosa um alt frá átrúna›i til heimsspeki. Hann tosar um filmir, lesir nógv og flennir nógv. Vit fáa at vita um hvussu hann toga›ist vi› føroyskar myndugleikar á fyrstu fer›ini til Føroya í 1986, hvussu vaktarskip lupu á vi› táragassi, hvussu hann skapp undan og hvussu hann skjeyt eftir vaktarskipinum vi› sjokolátubudingi.

Hann grei›ir frá, at hann einafer› var› bjarga›ur av einum særdum hvali. »Eg hugdi inn í hesi vitandi, vinarligu eygu, og hvalurin gjørdi av einki ilt at gera mær.«

Vidal skrivar, at ta› kann vera at Watson heldur ta› er í lagi vi› fólkaræ›i á landi, men umbor› á »Ocean Warrior« er hann skiparin, tann einará›andi. Hann tekur ikki móti rá›um og hann grei›ir ikki frá sínum ætlanum. Sjálvur kallar hann seg ein ey›mjúkan fanatikara.

Alt ella einki

Hesufer› Watson er í Føroyum hevur hann avgjørt gera alt fyri at ste›ga føroyska grindadrápinum. Or›ini eru d‡r, um ta› skal vera, so vil hann láta lív fyri sína søk, hann bakkar ikki fyri at gerast pínslaváttur.

»Grindadrápi› er tann ljótasti ítrótturin í heiminum,« sigur Watson og hann ætlar at vera í føroyskum sjógvi leingi. Endamáli› er at legga ímillum, ver›ur grind hildin til og annars ætlar hann at royna at reka grindir aftur til havs, sum koma ov nær oyggjunum.

»Føroyingar drepa heilar familjur av hvalum og ongin sleppur undan, gomul sum ung í grindaflokkinum ver›a t‡nd. Vit eru í 21. øld og slíkir grúsamir si›ir hoyra ikki heima í nútí›ini, serliga ikki í einum samfelag, sum telist millum tey ríkastu í heiminum.« sigur Watson.

John Vidal stendur her vi› sí›una av Watson umbor› á Ocean Warrior í Nórlsoyarfir›i herfyri

Gamal í gar›i

Watson er ikki hvør sum helst innan umhvørvisvernd. Hann var ein av stovnarunum av einum umhvørvisfelagsskapi fyrst í sjeytiárunum, sum seinni gjørdist til hin navnframa Greenpeace. Hann var vi› at mótmæla amerikonsku brintbumburoyndunum vi› Aleutirnar, langi oyggjagar›urn, sum gongur su›ur úr Alaska og lagt su›ur Kyrrahavi›.

Virksemi hjá Watson kostar um sjey milliónir føroyskar krónur á hvørjum ári og hetta virksemi ver›ur fíggja› av teimum 45.000 limunum sum eru í felagsskapinum Sea Shepherd og frá stu›li frá ríkum Hollywood og Las Vegas vi›haldsfólki. Í næstum byrja upptøkurnar til ein film um virksemi› hjá Watson. Filmurin er mettur at kosta 50 milliónir dollarar ella eini 350 milliónir krónur.

HOTEL FÖROYAR UM ÓLAVSØKUNA

Stóra kalda borðið kr. 225,-

Opið er soleiðis:

Ólavsøkuaftan 28/7 kl. 16.00-22.30 • Ólavsøkudag 29/7 kl. 14.00-22.30

Matstovan "ATLANTIS" bjóðar:

Hósd. 27/7, Ólavsøkuaftan 28/7, Ólavsøkudag 29/7

A la Carte, kr. 195,-

Forrættir kr. 40,-
Rækjubland við salati, dippi og heimabakaðum breyði.
Aspargessuppa við asparges við heimabakaðum breyði.

Høvuðsrættir kr. 145,-
Búff Bearnaise v/ salati, bakaðum epli og Bearnaisesós.
Kryddaður búffur v/ smørdampaðum grønmeti, kryddsmøri og bakaðum epli.
Lambasteik v/ reyðkáli, brúnum eplum og sós av soðnum.
Oksasteik v/ grønmeti, glaseraðum smáleyki, eplum og sós av soðnum.
Stoktur laksur við spinatkremi, grønmeti og rísi.

Omaná kr. 40,-
Ísdessert a la Hotel Föroyar.
Sjokolátumousse.
3 rættir kr. 195,-

Opið er soleiðis:
Hósdagin 27/7 kl. 12.00-22.30
Ólavsøkuaftan 28/7 kl. 12.00-16.00
Ólavsøkudag 29/7 kl. 12.00-14.00
Sunnudagin 30/7 kl. 12.00-22.30
-har kalt borð eisini er í matstovuni
Børn undir 12 ár eta ókeypis saman við vaksnum (1 barn pr. vaksin)

Sosialurin - 311820

HOTEL FÖROYAR ynskir øllum eina góða Ólavsøku!

HF Hotel Föroyar

Best Western

Tel. 317500
Hotellið við útsýninum